gult cyan magenta svart



# Skrivstovufólk
## fyristøðufólk

**Starvsfólkadeildin søkir eftir fyristøðufólki.**

**Vit bjóða**
Eitt sera spennandi og avbjóðandi starv innan starvsfólkaøkið hjá einum av størstu arbeiðsgevarunum í landinum, sum hevur umleið 900 fólk í starvi. Til tess at avgreiða lønir o.o. viðurskifti verður nýtt nýmótans tøkni, t.d. nýggj lønarskipan, elektronisk journal, klokkuskipan, heimabanki, teldupostur og internet. Neyðug skeið verða givin, so tú kanst menna teg persónliga og fakliga.

**Arbeiðsuppgávur**
Høvuðsuppgávan hjá fyristøðufólkinum er, við tilvísing til lønarfulltrúan, at hava ábyrgdina av lønaravgreiðsluni fyri allar stovnar og deildir hjá kommununi, og tryggja lønarútgjaldingarnar eru í tráð við ásetingarnar í sáttmálum og avtalum.

Harumframt kemur tú at vera við til at taka tær av ymiskum starvsfólkamálum, t.d. at samráðast við feløg og einstaklingar um lønar-, sáttmála-, og starvsviðurskifti. Eisini verður tú við til at menna starvsfólkapolitikkin hjá kommununi og gera smidligari og betri arbeiðsgongdir innan starvsfólkaøkið.

Nakrar av uppgávunum eru:
* At gera lýsingar eftir starvsfólki
* Avgreiða setunaravtalur og starvsváttanir
* Vera við til fíggjarætlanararbeiðið
* Vegleiða og hjálpa deildum og stovnum í starvsfólkamálum

**Førleikakrøv**
Neyðugt er at tú er hugaður fyri starvsfólkarøkt og yrkisviðurskiftum. Er nærlagdur, kann arbeiða sjálvstøðugt, er førur fyri at lýsa trupulleikar og finna bestu loysnirnar. At duga væl at samskifta, læra frá sær og at samráðast við bæði einstaklingar og starvsfólk er avgjørt ein fyrimunur.

**Setunarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv sum verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum við Tórshavnar kommunala starvs- og tænastumannafelag.

**Meira fæst at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, ella Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 24. juli 2000. Merk umsóknina "Fyristøðufólk".

Á starvsfólkadeildini, sum húsast í ráðhúsinum á Vaglinum, starvast í løtuni fýra fólk. Eisini eru tveir næmingar knýttir at deildini. Lønarútgjaldingin til tey umleið 900 starvsfólkini er umleið 110 mió. kr. um árið. Deildin umsitur fólk innan 14 sáttmálaøki.

# Skrivstovufólk

**Starvsfólkadeildin søkir eftir avloysara.**

Av tí at skrivstovufólkið, sum nú røkir starvið, hevur átikið sær at vera avloysari á aðrari deild, verður við hesum søkt eftir avloysara.

**Starvsøki**
Talan er um eitt spennandi og fjølbroytt starv, har tú kemur at taka tær av nógvum ymiskum uppgávum. Høvuðsarbeiðsstaðið verður á starvsfólkadeildini, har tú kemur at taka tær av starvsfólka og lønarmálum, men viðhvørt, tá á stendur, er neyðugt at tú kanst hjálpa til á øðrum deildum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava skrivstovu- ella líknandi útbúgving. Kunnleiki til edv á brúkarastøði er neyðugur.

**Setunarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv sum verður sett skjótast til ber og í fyrsta umfari til 1. mars 2001. Løn sambært sáttmálanum við Tórshavnar kommunala starvs- og tænastumannafelag.

**Meira fæst at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, ella Jens M. Poulsen, kommunustjóra, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 24. juli 2000. Merk umsóknina "Skrivstovufólk".

# Heilsuatstøðari

**Ellis- og umlættingarheimið søkir heilsuatstøðara (sosial og sunnheitsassistent).**

**Starvið**
umfatar røkt og umsorgan av búfólkunum, umframt reingerð. Arbeiðstíðin er 3/4 tíð og er skipað í vaktum.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. september 2000, og er lønt sambart sáttmálanum millum Sjúkrahjálparafelagið og fíggjarmálastýrið.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sólgerð Djurhuus, leiðara, tlf. 311839.

**Umsókn**
saman viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 17. juli 2000. Merk umsóknina "Heilsuatstøðari".

Tórshavnar kommuna



Lýsið í **sosialinum**

# Frá S&K-felagnum

Vegna summarfrí er skrivstovan stongd frá **17. juli til 14. august.**

**S&K-skrivstovan, tlf. 316837**
e-mail: skfelag@post.olivant.fo

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Toyota Avensis 2.0 TD Sedan
**Árg.:** 2000
**KM:** 717

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast á Smyrilsvegi.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

tlf. 345600 · lokal 727
Fartlf. 283892
at hitta millum kl. 13-15
Fróði Müller

# Frá Føroya Psoriasisfelag

Vit vilja hervið boða frá, at komandi viðgerðartúrur fyri psoriasis til Bláa Lónið verður 8/9-2000 og heimaftur tann 6/10. Tey, ið hava tørv á viðgerð verða biðin um at fara til egnan kommunulækna. Læknin fyllir umsóknarblaðið út og sendir tað til húðlæknan. Umsóknin skal latast inn seinast tann 7/8-2000. Eru ivaspurningar hesum viðvíkjandi eru tit vælkomin at ringja tlf. 424179.

Samstundis boða vit frá, at aðalfundur felagsins verður í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10 c, mánadagin 17/7 kl. 20.

**Vinarliga**
**Føroya Psoriasisfelag**




SMS · Tel 353535 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo
**- FLØGUDEILDIN**

*Vinarliga send mær:*
_____ eintøk av "Malan", á kr. 159.-
Navn: __________
Búst.: __________
*Útfyll lepan, klipp hann út og send hann til:* ***3-arin, Postboks 1057, 110 Tórshavn***



**Starv**

# Ferðaseðlasamskipari

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Strandfaraskipum Landsins er at hækka tænastu- og góðskustøðið innan fólkaflutningin. Í hesum sambandi verður søkt eftir einum ferðaseðlasamskipara (M/K) til fólkaflutningsdeildina - Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir.

Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður kann byrja skjótast gjørligt.

**Uppgávurnar hjá fólkaflutningsdeildini**
Fólkaflutningsdeildin skal veita eina úrslitagóða fyrisiting innan fólkaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan fólka- og akfarsflutningin hjá fyritøkuni.

Virksemið á deildini fevnir um hesar høvuðsfunktiónir:

- Planlegging
- Rakstur (skip og bussar)
- Ferðslusamskipan
- Ferðaseðlasamskipan

**Uppgávur hjá ferðaseðlasamskiparanum**
Ferðaseðlasamskiparin skal tryggja eina effektiva tilrættalegging og samskipan av ferðaseðlaskipanini á Bygdaleiðum og Oyggjaleiðum.

Uppgávur hjá samskiparanum verða m.a.:
- Samskipa, stýra og hava eftirlit við dagligu ferðaseðlasøluni
- Umsita sentralu edv-skipanina "Buscom"
- Umsita viðlíkhald og umvælingar av ferðaseðlamaskinum
- Útskriva rapportir o.a. úr ferðaseðlaskipanini
- Gera regluligar frágreiðingar um virksemið innan ferðaseðlaskipanina
- Upplæring í ferðaseðlasølu, herundir nýtslu av Buscom-maskinum
- Innan- og uttanhýsis samstarv og samskifti.

**Førleikakrøv**
- Útbúgving innan umsiting, fyriskipan, handil e.l.
- Áhugi og royndir innan kunningartøkni
- Kunnleiki og royndir viðvíkjandi flutningsskipanum er ein fyrimunur
- Málrættaður
- Góðan røkjuskap
- Góð samstarvsevni

Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, har ferðaseðlasamskiparin skal vera við til at víðari menna hesa funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Vakt eftir vanliga arbeiðstíð

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 17. juli 2000.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Hera Joensen, deildarleiðara, á tlf. 34 30 00 ella e-postur: hej@ssl.fo.

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / - Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður við hesum gjørt kunnugt, at Miðvágs bygdaráð á fundi 05. juli 2000 samtykti at leingja verandi byggisamtykt fyri alla Miðvágs kommunu at galda frá 2000 til 2010. Byggisamtyktin verður løgd fram til alment eftirlit á bygdaráðsskrivstovuni í arbeiðstíðini frá mánadegnum 10. juli til mánadagin 31. juli, báðir dagar íroknaðir.

Møgulig mótmæli móti byggisamtyktini, skulu skrivliga verða bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi týsdagin 10. oktober 2000.

**Miðvágs kommuna**

# MBF-grunnurin

Hesi nr. eru drigin:

| | |
|---|---|
| 1. 12198 | 2. 13037 |
| 3. 9474 | 4. 8375 |

Vinnararnir kunnu boða frá á tlf. 317373.
**Vit takka fyri stuðulin.**

# Summarfrí

Sjúkrakassi Fuglafjarðar læknadømis verður stongdur frá 17. juli 2000 til og við 11. august 2000.

**Sjúkrakassi Fuglafjarðar Læknadømis**
Fuglafjørður

# Túgvurnar í Ognarhaga

Smátturnar eru opnar fyri almenninginum sunnudagin 16. juli frá kl. 14.00 til 20.00. Leigað verður út frá 17. juli.

Inntil 16. juli er telefonnummarið til bílegging 421723.

Kostnaður fyri eina viku er kr. 3.500, fyri vikuskifti kr. 1.500 og fyri ein dag kr. 600. Depositum er kr. 1.000.

**Glitnir**
Korkagøta 14 · FO 100 Tórshavn

# Stuðulsfólk

Vegna ov fáar umsóknir, lýsa vit av nýggjum eftir tveimum stuðulsfólkum til 39 ára gamla kvinnu, sum situr í koyristóli og býr í Vágum.

Arbeiði verður gjørt í samstarvi við kvinnuna sjálva og Almannastovuna. Arbeiði hjá stuðlinum er millum annað, at hjálpa kvinnuni við ymiskum praktiskum uppgávum inni. Koyra hana, tá hon skal út, fara við henni til ymisk tiltøk og annars hjálpa henni við slíkum, sum hon vegna sjúkuna ikki er før fyri at gera longur.

Arbeiðstíðin er tilsamans 40 tímar um vikuna fyri báðar stuðlarnar. Arbeitt verður í skiftandi arbeiðstíðum og í vikuskiftinum. Setunartíðin er frá 1. august 2000.

Neyðugt er, at tey, ið sett verða, hava koyrikort.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir mugu verða okkum í hendi skjótast møguligt og í seinasta lagi 17. juli 2000. Umsóknir skulu vísa til j.nr. 1999-02/0888 og skulu sendast til:

**Almannastovan**
Stílað: Minna Jacobsen
Postsmoga 3096
110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja til Karin á Heygum, tlf. 314822 ella Minnu Jacobsen, tlf. 315480 millum kl. 9 og 13, tó ikki mikudag.

# Timburmenn/ forskallarar

Søkt verður eftir timburmonnum og forskallarum til støðugt arbeiði.

**P/F Guttesen & Staksberg**
Tlf. 313495

# Summarfrí

Skrivstovan verður stongd vegna summarfrí í tíðini frá mánadegnum 24. juli til mánadagin tann 21. august 2000.

**Sørvágs Kommuna**

Stuðulsstovnurin

Í tíðarskeiðnum frá mánadegnum 17. juli til mánadagin 7. august 2000 verður ongin avgreiðsla á Stuðulsstovninum vegna summarfrí.

**Stuðulsstovnurin**
Hoyvíksvegur 72 · Postrúm 3279
110 Tórshavn
e-mail: studul@studulfo